

*Mynd: Kári við Rættará*

# Pylsuhugni í miðbýnum

Gekst tú tær ein túr fram við Káta Horninum í miðbýnum í Havn hóskvøldið, kundi tú ikki umgangast at leggja merki til pylsuvognin, sum stóð á trappuni frammanfyri Ebenezer.

Eini 80-100 ungfólk stóðu rundan um pylsuvognin ella sótu á trappuni við hvør sínum hotdog.

Hetta var nú ikki ein upphiting til ólavsøkuna, men partur av hugnakvøldi, sum tey ungu í Ebenezer skipaðu fyri í sambandi við at farið verður yvir til summarskránna fyri ungdómstiltøkini í Ebenezer.

Í summar verða ungdómsmøtini flutt frá hóskvøld til leygarkvøld, og tá eru tey ungu í Lívdini eisini við til at skipa fyri. Nakrar hundrað pylsur fingu bein at ganga á hetta kvøldið.

**Dagurin**

**21. juni. Longsti dagur.** Sólstøður, tá ið sólin stendur hægst á luftini um miðdagin. Kann vera 21. ella 22. juni. Dagurin eitur eisini Albanus. Hann var úr Onglandi, og gjørdist biskupur í Mainz, har hann varð hálshøgdur, tá ið vandalar um ár 400 søktu at býnum.

**22. juni. 10.000 blóðvitnismenn.** Allir í eini herdeild hjá keisaranum Hadriani gjørdust kristnir. Eftir miklar pínslur vórðu teir krossfestir á einum fjalli, summi siga á Ararat.

**23. juni. Paulinus**, deyður ár 431. Franskur munkur, sum gjørdist biskupur í Nola í Italiu, har hann doyði úti við 80 ára gamal.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Sunnevu Johannessen** fer úr Kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í kirkjuna fríggjakvøldið kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin kl. 13.30.

**Ludvík Abrahamsen, Klaksvík**, ættaður úr Oyndarfirði, andaðist mikudagin 18. juni, 81 ára gamal.

**Anna Maria Zachariassen** andaðist týsdagin 17. juni í Valby, 60 ára gomul.

**Elin Maria Berg Jacobsen, Søldafjørður**, fødd í Froðba, andaðist týsdagin 17. juni á Landssjúkrahúsinum, 84 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Elim í Søldafirði leygardagin kl. 14. Tey, sum vilja minnast Mariu, kunnu lata eina gávu til barnalegurnar við Ástjørn í Íslandi, konta í Norðoya Sparikassa.

**Anna Elisabeth Vang, Tórshavn**, vanliga nevnd Lillan í Grønlandi, andaðist sunnudagin 15. juni, 90 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum leygardagin klokkan 13.

## Tøkk



Eg takki hjartaliga vinum og heimarøktini, ið gjørdu 70 ára føðingardagin tann 17. juni 2008 sera hugnaligan. Stóra tøkk fyri alt.

**Heilsan**
**Hans Juul Poulsen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá góði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

**Poul Eyvindsson**
Tvøroyri

doyði og varð jarðaður. Takk fyri troystarrík orð, takk fyri blómur, kransar og gávur til Salem. Takk fyri alla hjálp til ervið, og takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til gravar. Harrin signi tykkum øll.

**Dagnhild, Oscar og Nelli,**
**Ella og Moodi og børnini**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk bera vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu, samkenslu, hjálpsemi og stuðul, tá okkara elskaði, maður, pápi , verpápi og abbi

**Per Hansen**
Glyvrar

so brádliga varð tikin frá okkum, bert 60 ára gamal.

Somuleiðis vilja vit takka tí stóra skara, sum fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Herborg, Mona og Beinta v/ fam.**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Jaspur Stanley Larsen**
Oyrarbakka

brádliga andaðist og varð jarðaður.
Ein serstøk heilsan til Henning Bøgesvang, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Eina hjartans tøkk til tykkum mongu, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk fyri blómur, kransar og tær peningagávur, ið latnr vórðu Leguhúsinum í Nesvík.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Andrea, Mary, Anna, Jónhild og Hans Pauli**